# Sosialurin

Nr. 11 • týsdagur • 18. januar 2005 • 79. árgangur • Kr. 13,00

www.sosialurin.fo




Søgan um eina dós

vinnusiðirnar 30-31



Christian í Manchester City:

## Málið er Premier League

ítróttur, síða 43-47



Edmund í Operuni:

## Stórsligin uppliving

síða 6



Samgonguætlan:

## Nýggi Smyril í Skotlandssigling

Síða 28



*Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil, á veg við umsóknunum. Her móttikin av Sigurð í Jákupsstovu, stjóra á Oljufyristitingini*

*Mynd: Jan Müller*

# Statoil stóri vinnarin

– Vit hava fingið tað vit fóru eftir í 2. útbjóðing sigur Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil, sum má sigast at vera veruligi vinnarin í útbjóðingini á landgrunninum, nú felagið er við í ikki minni enn fýra av teimum sjey loyvunum, sum eru latin. Tað ger heldur ikki støðuna verri, at Statoil herfyri keypti seg inn í eitt loyvi nær føroyska markinum, sum nú helst vísir seg at vera eitt stórt oljufund

Vinnusíðurnar 15-42


Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!



Arjgjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo Sosialurin

AKUPUNKTUR KLINIKKIN



v/sjúkrasystir og akupunktøri Petra Gardar Neumann

☎ 27 34 12

www.akubehandling.dk

tvis køkar og bað



pf Klement Petersen

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60 · Fax 44 84 60 · klp@post.olivant.fo

Sosialurin 341800

VINNU SÍÐURNAR

Nr. 11 • týsdagur • 18. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ein oljuráðstevna í rættari løtu

**Fyrrapartin í dag verður Oljuráðstevnan 2005 sett. Hon kemur í eini sera spennandi tíð fyri føroyska oljuvinnu. Nú skal støðan gerast upp og hyggjast skal inn í framtíðina**

OLJURÁÐSTEVNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað verður ein sera aktuell og "just-in-time" ráðstevna um olju, sum verður sett í Norðurlandahúsinum í dag.

Fyrr í vetur varð boðað frá einum stórum oljufundi beint við føroyska markið. Í gjár varð almannakunngjørt, hvørji feløg hava fingið loyvi til at leita eftir olju í føroyskum sjóøki. Og í dag fáa fólk so høvið at gera status og hyggja inn í framtíðina innan oljuvinnuna.

Tað er tí ikki uttan orsøk, at Magni Arge, ið sum formaður í Oljuvinnfelagnum er fyrireikari av stevnuni sigur tað soleiðis:

– Her fáa vit ein ótrúligan møguleika at hittast og tosa saman. Út frá hesum kunnu vit so fáa eina 100% dagførda vitan um, hvar vit flóta í oljuvinnuni í løtuni!

Stevnan verður sett í morgun og heldur fram í allan dag við fyrilrestrum, samrøðum og tjaki.

### Nýggj luft

Skráin fyri ráðstevnuna er nevnd aðrastaðni á hesum vinnusíðunum, og har eru nógv sera áhugaverd evni á skránni.

Øll evnini eru sera viðkomandi, og fyri Magna er trupult at taka nakað ávíst evni burtur úr, sum tað mest áhugaverda evnið. Hvørt teirra tykist vera meiri áhugavert enn hitt.

- Men tað er eingin ivi um, at tað eru viðurskiftini í framtíðini, sum upptaka meg og okkum mest á ráðstevnuni.

- Tað hevur ikki verið so øgiliga nógv virksemi innan oljuvinnuna hetta seinasta árið. Og tí er hetta eitt sera hent høvi til at blása nýggja luft inn í tjakið um hesa vinnuna, sigur hann.

At so ráðstevnan verður hildin beint eftir at loyvini til annað umfar í oljuleitingini í føroyskum sjóøki eru latin, ger hana bara enn meiri aktuella og viðkomandi fyri føroyingar.

Tí fer Magni sjálvur at lurta við áhuga eftir tí, sum umboðini fyri tey bæði føroysku oljufeløgini hava at bera fram, um arbeiðið við oljuleitingini, nú olja er funnin tætt við føroyska markið.

- Jú, eg vænti at vit fáa eina sera góða ráðstevnu, har vit kunnu fáa lív aftur í tosið um oljuvinnuna í Føroyum, sigur Magni Arge.

### Bráddlig vend

Hetta seinasta árið hevur ikki verið so nógv virksemi á føroyska oljuøkinum. Men so kom brádliga vend í.

Hesar seinastu tríggjar mánaðirnar er so nógv hent: Funnin er olja nær við hjá okkum og í gjár varð so kunngjørt, hvørji feløg hava fingið loyvi at leita eftir olju.



*- Vit ynskja at fáa lív aftur í tosið um eina føroyska oljuvinnu, sigur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum*

Og í dag fáa so øll við áhuga í oljuvinnuni høvi at hittast til Oljuráðstevnuna 2005, har støðan í oljuvinnuni skal staðfestast, samstundis sum hyggjast skal frameftir.

Alt hetta verður lýst við fleiri fyrilestrum, har bæði føroyingar, men eisini menn úr Noregi, Bretlandi og Íslandi fara at siga frá teirra royndum við oljuvinnuni.

Á hesi stevnuni er tað jú oljan sum er í miðdeplinum. Men Magni leggur tó dent á, at hann eisini hugsar um fiskivinnuna.

Fiskivinnan gevur eisini sítt ískoyti til tann føroyska búskapin, men tað er neyðugt at vit fáa fleiri bein at standa á í framtíðini.

- Tað er ikki ein spurningur um okkara ella teirra, - um oljuna ella fiskin. Spurningurin og avbjóðingin er at menna allan tann føroyska búskapin, og tí er tað tann samlaða kakan, ið alt snýr seg um, sum hann málber seg.

# Viðkomandi skrá og áhugaverdir fyrilestrar

**- Úrslitið frá Rosebank/Lochnagar beint við føroyska markið er sera týdningarmikið, sigur Gregory T. Himes, Vice President of Global Exploration hjá Statoil. Hann vónar, at fundið fer at hava við sær fleiri góð leitiúrslit bæði í bretskum og føroyskum øki. Gregory T. Himes verður ein av framløgufólkunum á oljuráðstevnuni í dag**

Oljuvinnufelagið hevur valt at býta oljuráðstevnuna upp í tveir partar. Fyrri parturin snýr seg um oljuleiting á føroyskum øki, og seinni parturin um, hvat skal til fyri at tryggja vælferðina í Føroyum.

### Vónir um fleiri góð leitiúrslit

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum setir ráðstevnuna. So verður farið undir sjálvan oljupartin.

Av framløgum verður millum annað Sigurð í Jákupsstovu, stjóri í Oljufyrisitingini. Hann fer at greiða frá aðru loyvisrundu á føroyska økinum, millum annað hvørji oljufeløg fingu leitiloyvi eftir almannakunngerðingina í gjár, um arbeiðsskránna hjá teimum og hvørjar vónirnar eru fyri framtíðina.

Gregory T. Himes, Vice President of Global Exploration frá Statoil fer síðani at greiða frá teirra áskoðan um framtíðar olju- og gass leiting. Gregory T. Himes hevur sagt, at úrslitið frá Rosebank/Lochnagar beint við føroyska markið er sera týdningarmikið fyri arbeiðið hjá Statoil í hesum økinum. Hann vónar at fundið fer at hava við sær fleiri góð leitiúrslit bæði í bretskum og føroyskum øki.

Eisini Dave Lewis, Exploration Manager hjá Chevron Texaco fer at greiða frá hvørjar møguleikar tey síggja í Atlantsmótinum.

Statoil og Chevron Texaco hava júst kunngjørt at feløgini hava funnið eina stóra nøgd av olju og gassi í Rosebank/Lochnagar feltinum, har Chevron Texaco er fyristøðufelag og har Statoil eigur 30%. Feltið liggur beint við føroyska markið. Bæði Statoil og Chevron Texaco hava søkt um leitiloyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum.

Føroya Kolvetni var millum mest aktivu feløgini við seinastu loyvisrundu í Bretlandi. Eisini hevur felagið søkt um loyvi í aðru loyvisrundu í Føroyum. Graham Stewart, stjóri fer at greiða frá teirra virksemi í økinum. Eisini fer Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum, at gera status yvir teirra virksemi í Bretlandi.

Síðst í hesum parti fara Petur Joensen, deildarstjóri í Oljufyrisitingini og Regin Hammer, fyrisitari hjá FOÍB at greiða, hvussu pengarnir til førleikamenningina eru brúktir og hvat er komið burturúr.

### Vælferð í framtíðini

Næsti partur av oljuráðstevnuni er ikki minni áhugaverdur. Her verður spurt, hvussu tryggja vit vælferð Føroya í framtíðini?

Her verður lagt út við íblástri frá øðrum londum. Fyrst fer Thorvaldur Gylfason, professari í búskapi við Universitetið í Íslandi at greiða frá, hvussu støðan er í Íslandi. Víst verður á, hvat tey hava gjørt fyri at fáa búskapin minni tengdan at fiskivinnuni og harvið fingið eitt meira fjølbroytt vinnulív.

Somuleiðis fer Torger Reve, rektari og professari við BI Handilsháskúlan í Stavanger at tosa um at leggja ætlanir fyri vøkstur í einum samfelag, sum er so nógv merkt av einum tilfeingisbúskapi.

Johnny í Grótinum, cand. polit., Føroya Sparikassi, fer síðani at tosa um vinnupolitik og búskaparvøkstur í Føroyum. Zvonko Mrdalo, búskaparfrøðingur hjá Hagstovu Føroya fer at vísa á, at tað ikki er bara fiskur føroyingar útflyta, men eisini tænastur av ymiskum slag. Hetta vísur gjaldsjavnin hjá Føroyum, sum júst er gjørdur.

Síðstu framløguna hevur Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland. Hann fer at vísa á hvørjar forðingar hann sær í føroyska búskapinum fyri nýskapan. Hann fer eisini at koma við eini ætlan fyri, hvussu vit kunnu koma burtur frá hesi forðing.

*(Kelda: Heimasíðan hjá Vinnuhúsinum)*

# Statoil stóri sigursharrin

**Tað er ikki ov nógv sagt, at norska oljufelagið Statoil gjørdist stóri vinnarin í 2. útbjóðingini á landgrunninum. Statoil er við í meira enn helvtini av loyvunum og tykist við hesum at vera vorðið veruliga lokomotivið í oljuleitingini við Føroyar**

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

– Vit eru væl nøgd í Statoil. Vit hava sum so fingið tað vit fóru eftir í 2. útbjóðing sigur Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil, sum má sigast at vera veruligi vinnarin í útbjóðingini, nú felagið er við í ikki minni enn fýra av teimum sjey loyvunum, sum eru latin. Í trimum førum er Statoil fyristøðufelag, operatørur og í einum føri er tað í bólki saman við ChevronTexaco, Dong og OMV.

Við úrslitinum av hesum umfarinum má sigast, at norska oljufelagið er eitt tað mest virkna á Føroyaøkinum og tískil drívandi megin í lokomotivinum. Rúni Hansen sigur, at felagið leggur stóran dent á kanningarnar á landgrunninum og vísir samtíðis á, at tað hevur ikki gjørt støðuna verri her, at Statoil keypti seg inn í eitt loyvi í bretskum øki, sum nú helst vísir seg at vera eitt oljufund. Hann útilokar heldur ikki, at nettupp tað fundið kann fáa týdning fyri víðari gongdina á Føroyaøkinum. Tað hevur í hvussu er gjørt sítt til, at áhugin fyri 2. útbjóðing var so mikið stórur. Tað vísir seg eisini, at øll feløgini, sum eru við í fundinum í bretskum øki, eru at finna aftur í føroysku útbjóðingini. Somu feløg søktu nevniliga um økið okkara megin markið og fingu loyvið her.

Uppá fyrispurning hvussu tað ber til, at felagið hevur søkt einsamalt um tvey leitiloyvi sigur Rúni Hansen, at vanliga roynir tú í sambandi við at bora ein brunn at býta váðan, men í hesum førinum bar tað so á, at vit mettu tað vera best at vera einsamallir og kunnu harvið menna økini, áðrenn vit so møguliga seinni kunnu fara út og bjóða øðrum feløgum uppí í samband við at bora brunn. Um tað fer at koma so langt.

Hvat heldur Statoilstjórin um, at tvey nýggj feløg sum ChevronTexaco og OMV nú eru komin inn á Føroyaøkið!




*Henda myndin talar fyri seg. Statoil er vónin á Føroyaøkinum, nú felagið er tað mest virkna oljufelagið á landgrunninum*



*Rúni Hansen, stjóri í Statoil hevur alla orsøk til at smílast, nú Statoil hevur fingið tillutað heili fýra leitiloyvi av teimum sjey. Her er hann á veg við umsóknunum til Oljufyrisitingina. Stjóri Sigurd í Jákupsstovu tekur ímóti tí altíð vælupplagda fuglfirðinginum*

*Mynd Jan Müller*

## Úrslitið av 2. útbjóðing

### Loyvini, ið eru latin, eru hesi

Loyvi nr. 008
ChevronTexaco 40%
Statoil 30%
Dong 20%
OMV 10%

Loyvi nr. 009
Statoil 50%
Shell 20%
Dong 20%
Føroya Kolvetni 10%

Loyvi nr. 010
Statoil 100%

Loyvi nr. 011
Statoil 100%

Loyvi nr. 012
Føroya Kolvetni 100%

Loyvi nr. 013
Geysir 60%
Atlantic Petroleum 40%

Loyvi nr. 014
Geysir 60%
Atlantic Petroleum 40%


sosialurin
frælsi javnaður bróðralag
Í dag
Persónligt frælsi
Tórshavnar býráð ætlar at læna 14 millj. kr. úr Schweitz
Seismiskar kanningar undir Føroyum
Kyndil aftur stórtap

*Oljuleiting við Føroyar má sigast at vera komin á eitt vegamót, nú 2. útbjóðing hevur verið og varð almannakunngjørd seinnapartin mánadagin. Áhugavert er í hesum sambandi at kaga í Sosialin fyri umleið 30 árum síðani, tá fyrstu útmeldingarnar komu um oljuleiting. Eitt amerikanskt oljufelag bað um loyvi til at gera seismiskar kanningar við Føroyar*




*Soleiðis sá Óli Petersen oljuleitingina á Atlantsmótinum fyri skjótt 15 árum síðani, tá hann í 91 hevði hesa stuttligu og sigandi tekningina frá leitingini hinumegin markið. Í dag er so støðan tann, at oljufund nettupp hinumegin markið hevur skapt stóran áhuga fyri leiting her og er møguleiki fyri, at ein oljukelda í bretskum øki heldur fram inn á føroyskt øki*




*Mynd Jens K Vang*

- Fyri Føroyaøkið er tað sera gott, at nýggj feløg koma við. At eitt stórt felag sum ChevronTexaco er komið inn á landgrunnin er sera positivt, tí tað hevur nógva vitan um alt Atlantsmótið.

Í dag telist Statoil millum fremstu loyvishavararnar á øllum Atlantsmótinum. Felagið hevur flestu loyvini á landgrunninum, íalt seks. Av teimum er felagið fyristøðufelag í fimm loyvum. Á bretskum øki er Statoil við í fýra loyvum, teirra millum stóra framleiðandi Schiehallionfeltinum.

Hví er Statoil so fokuserað uppá Føroyaøkið?

- Vit hava lagt eitt stórt arbeiði í Føroyaøkið heilt frá byrjan. Tað vóru onkur vónbrot í byrjanini, tá vit boraðu ein turran brunn. Kortini hava vit gjørt eitt stórt tekniskt arbeiði og hava skotið nógvan seismikk síðani vit boraðu. Vit síggja, at váðin er stórur á, og her eru nógvar teknologiskar avbjóðingar fyri framman, serliga tá hugsað verður um basaltið. Men vit halda framvegis, at hetta er vert at fara eftir. Við tí vitan vit hava á Føroyaøkinum og økinum kring okkum og við tí virkni , sum Statoil leggur fyri dagin, so halda vit, at her er nakað at fara eftir. Økið er enn ov gott at fara frá.

Loyvini í 2. rundu eru frá 3 til 5 ár. Í byrjanini verður farið at skjóta seismikk. Síðani er eitt skotbrá frá 3 til 5 ár, har man ger av, um man skal átaka sær eitt boriforpliktilsi. Ætlanin er at fara at skjóta seismikk í summar og tey fyrstu árini verða nýtt til at kanna, um tað er vert at taka eitt boriforpliktilsi á okkum ella ikki sigur Statoilstjórin.

Statoil fer saman við ChevronTexaco, Dong og OMV at bora avmarkingarbrunn hinumegin markið í summar. Hann útilokar ikki, at verður hetta væleydnað, kann tað fáa positiva ávirkan fyri arbeiðið á Føroyaøkinum. Statoil skal bora enn ein brunn í 1. útbjóðing. Tað hevur verið frammi fyrr, at prospektiviteturin í tí verandi økinum er ikki so góður, og tað er tí avgjørt ein møguleiki at flyta henda brunnin inn á 9 ára loyvi.

Rúni Hansen sigur, at tað nú umræður at halda fram við kanningunum á landgrunninum. Tað týdningarmesta er kontinuiteturin – at arbeiði er í gongd, samtíðis sum nakað er í gongd í bretska økinum eisini. Í næstum fer Statoil at flyta skrivstovuna oman á Bryggjubakka.



*Longu í 1991 var eitt seismikkskip á Havnini, helst tað fyrsta nakrantíð. Tað var Patric Haggarty. Umborð vórðu eisini jarðalifrøðingar, sum hava kannað landgrunnin. Her er ein teirra, sum Sosialurin bað peika út tað mest áhugaverda økið á landgrunninum. Tað vísir seg, at júst hetta er eitt av økjunum, har Statoil einsamalt hevur fingið leitiloyvi í 2. útbjóðing*
*Mynd Jan Müller*

# Atlants Kolvetni góðar vónir



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni væl nøgdur við útbjóðing*

**Meðan onnur smærri oljufeløg hava søkt saman við teimum stóru, so søkti Atlants Kolvetni saman við Geysir, sum má roknast hoyrandi til tey smærri oljufeløgini. Wilhelm Petersen, stjóri sær ongan vansa í hesum, at teir ikki eru saman við teimum stóru, kanska heldur tvørturímóti**

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

– Vit eru sera væl nøgdir við úrslitið av útbjóðingini, tí vit hava fingið stóran part av tí, sum vit søktu um. Hetta er ótrúliga gott sigur stjórin í Atlants Kolvetni, Wilhelm Petersen. Felagið søkti saman við Geysir um fýra ymisk øki og fingu tey tvey loyvi. Annað loyvið liggur út til markið og hitt eitt sindur longur vestari. Wilhelm Petersen sigur, at tá tú søkir um so nógv øki, so er einki løgið í tí, at tú ikki fær alt tú kundi ynskt tær. Vit hava fingið part av tí, sum var okkara 1. prioritetur og 2. prioritetur. Hetta skuldi tí verið ein góð samanseting.

Meðan onnur smærri oljufeløg hava søkt saman við teimum stóru, so søkti Atlants Kolvetni saman við Geysir, sum má roknast hoyrandi til tey smærri oljufeløgini. Wilhelm Petersen sær ongan vansa í hesum, at teir ikki eru saman við teimum stóru, kanska heldur tvørturímóti. –Atlants Kolvetni er komið hartil, at vit bæði arbeiða saman við stórum oljufeløgum og við smærri feløgum. Vit eru saman við stórum oljufeløgum bæði í 1. útbjóðing á føroyskum øki, her eitt nú Amerada Hess, BG og Dong og nú eisini saman við stórum feløgum á bretska landgrunninum. So tað merkir einki fyri okkum, at vit ikki í hesi útbjóðingini ikki eru saman við stórum oljusamtøkum.

Wilhelm Petersen heldur tað vera sera áhugavert fyri teir at vera saman við einum minni felag, tí harvið hevur Atlants Kolvetni so mikið stóran part av loyvinum. Í báðum loyvum er talan um eitt býti uppá 60 til 40%. Geysir er fyristøðufelag og hevur harvið tey 60%. Talan verður tó um eitt sera javnbjóðis samstarv. Geysir fer ikki sum operatørur at lata skrivstovu upp í Føroyum, men fer at brúka skrivstovuna hjá Atlants Kolvetni í Nólsoyar Pállstovu. Talan fer at vera um sera tætt samstarv.

Atlants Kolvetni hevur í løtuni nógv jørn í eldinum. Høvuðsfokus er á trý oljufelt í bretskum øki, sum verða bygd út júst nú. Tey fara við nógvari orku hjá felagnum. Her er fyrst og fremst talan um fyrrverandi fólk hjá Amerda Hess, eitt nú Richard Hardmann, sum eisini hava nógvar royndir á føroyskum øki. Menn, sum Richard Hardmann koma sostatt at arbeiða tætt saman við eitt nú Terja Hagevang og Dag O. Larsen hjá Geysir. Wilhelm Petersen heldur sjálvur, at teir við hesum fólkum hava fingið eitt sera gott team og uttan iva nakað av tí bestu kompetansuni tú kanst fáa í oljuhøpi, tá tosað verður um leiting. Tað man vera á hædd við alt annað tú kanst fáa í bransjuni.

Strategiin er tann, at tað verður arbeitt við økjunum tey fyrstu tvey til trý árini tvs. at gera tey búgvin. Tá so tíðin kemur til at fara undir at fyrireika boring, verður tað so aktuelt at tosa við onnur størri feløg, sum hava royndir og kapital á tí økinum. Wilhelm Petersen útilokar so heldur ikki, at teir við tíðini kunnu taka upp samband við onnur størri feløg um at taka lut og gerast partur í teirra loyvum.

Hann vísir eisini á, at Atlants Kolvetni er við í einum brunni frá 1. útbjóðing, sum enn ikki er boraður. Hann skal borast áðrenn 2007. Sum skilst eru samráðingar millum henda bólkin og onnur oljufeløg og føroyskar myndugleikar um møguliga at flyta brunnin inn á okkurt av 9 ára loyvunum. Tað kann so vera á loyvunum hjá Anadarko, ENI ella Statoil.

### 70 mill. kr. banka á dyrnar

Í dag eru umleið 3000 partaeigarar í Atlants Kolvetni. Samlaði partapeningurin er umleið 120 mill. kr. Marknaðarvirðið liggur tó væl omanfyri 200 mill. kr. Wilhelm Petersen sigur, at seinasta tekningin av partapeningi var sera væl eydnað og gav 74 mill. kr. Nú var tekningin um jóltíðir og hetta kann hava gjørt, at fleiri útlendskir íleggjarar fingu ikki høvi til at vera við. Tað hevur so víst seg aftaná, at fleiri slíkir íleggjarar í útlandinum hava víst felagnum og virksemi tess stóran áhuga. Wilhelm Petersen upplýsir, at teir hava fingið fyrispurningar úr útlandinum frá 4-5 íleggjarum um at seta aðrar 70 mill. kr. í felagið. Tað má so bíða til eina aðru ferð. Tað líðir annars væl til, at Atlants Kolvetni er eitt av teimum størstu feløgunum í Føroyum. Nú virksemið veksur og arbeiðast skal báðumegin markið hevur felagið brúk fyri fleiri fólkum. Í næstum verða tí trý fólk aftrat sett í Gongini 10. Umframt skrivstovuna í Havn eru eisini fleiri fólk í Bretlandi, sum eru knýtt at felagnum.



*Geysir og Atlants Kolvetni lata umsóknirnar inn*



Geysir um 2. útbjóðing:

# Føroyar aftur á altjóða oljukortið

**2. útbjóðing fer heilt givið at seta Føroyar á aftur altjóða oljukortið. Tað er alt ov tíðliga at vera svartskygdur og í 2. rundu eru eisini fleiri sera spennandi og góðir strukturar í undirgrundini sigur Terji Hagevang, stjóri í Geysir. Hann heldur, at øll oljufeløgini eiga at arbeiða saman á føroyaøkinum**



*Terji Hagevang, stjóri í Geysir fegin um at hava fingið síni fyrstu leitiloyvi á landgrunninum*

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

– Eg eri sera fegin um, at Geysir saman við Atlantic Petroleum hava fingið tvey loyvi í 2. útbjóðingini. Fyri meg persónliga hevur hetta eisini nakað serligt at siga, nú hetta eru fyrstu loyvini eg havi verið við í , hóast eg havi arbeitt við føroyska økinum í mong mong ár. Hetta sigur Terji Hagevang, stjóri í Geysir, sum longu tíðliga í 90-unum var við í Saga Petroleum, sum tá royndi at fáa leitiloyvi á landgrunninum men sum seinni varð uppkeypt av øðrum feløgum. Terji Hagevang vísir á, at í byrjanini av oljutilgongdini í Føroyum knýttu Atlants Kolvetni og Saga samstarv. Men tá Saga varð uppkeypt, fór føroyska felagið í samstarv við m.a. Amerada Hess í 1. útbjóðing, hvat Hagevang heldur var sera skilagott. –Tað er hugaligt at vita sær, at vit hava havt so tætt samstarv frá byrjan av og nú aftur kunnu fara inn í eitt samstarv, hesaferð gjøgnum felagið Geysir.

Terji Hagevang sær tað annars ikki sum nakran trupulleika, at Geysir og Atlants Kolvetni ikki eru saman við nøkrum stórum feløgum í 2. útbjóðing. Tað er heilt vanligt aðrastaðni eisini, tá leitiøki verða boðin út, at smærri feløg taka seg saman um leitiloyvi. Hetta er ein heilt náttúrligur útviklingur. Tað er bara í Noregi, at tey stóru feløgini eru so nógv við. Terji Hagevang sær tað heldur ikki sum nakran trupulleika, tá talan er um kapital. Tað er nevniliga nokk til av kapitali í heiminum. Hevur tú góðar verkætlanir, so ber eisini til at fáa kapital. Bæði Geysir og Atlants Kolvetni hava havt eydnuna við sær, nú tey hava verið úti eftir meiri kapitali. Tað er oftani, tá tú manglar kompetansu, hugskot og kreativitet, at tað verður ein trupulleiki. Men tann trupulleikan haldi eg ikki vit sum smá feløg hava, kanska heldur tvørturímóti.

Stjórin í Geysir vísir á, at frá eini støðu við kapping um bestu loyvini so kemur nú ein tíð, har samstarv stendur ovast. – Øll feløgini, sum eru virkin á landgrunninum, bæði tey frá 1. og 2. rundu mugu nú royna at fáa eitt samstarv í lag, loysa tær avbjóðingar, sum eru fyri at kunna røkka endamálinum, ið er at finna olju og gass í føroysku undirgrundini. Kannað eigur at verða um tað ikki ber til at fremja kreativar loysnir, sum kunnu spara øllum feløgunum pening og orku. Eitt slíkt samstarv kundi m.a. snúð seg um at savna inn seismiskar upplýsingar í felag og sum kundu økt møguleikan at finna olju í økinum sum heild.

Uppá fyrispurning um møguligt er hjá øðrum feløgum at fara upp í loyvini hjá eitt nú Geysir og Atlants Kolvetni seinni sigur Terje Hagevang, at hetta er heilt vanligt, tá loyvi eru latin. Uppgávan er nú at gera kanningar á loyvunum og skuldi tað víst seg, at onnur feløg eru hugað fyri at koma uppí hetta arbeiði, so verður sjálvandi tosað við tey um tað. Tað er altíð gott at spjaða ein váða.

Terji Hagevang ivast annars ikki í, at 2. útbjóðingin fer heilt givið at seta Føroyar á aftur altjóða oljukortið. Tað er alt ov tíðliga at vera svartskygdur og í 2. rundu eru eisini fleiri sera spennandi og góðir strukturar í undirgrundini.

# DONG trýr uppá Atlantsoljuna

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

Við ikki færri enn 18 leitiloyvum í bretskum og føroyskum øki tilsamans má sigast, at danska oljufelagið DONG er eitt av teimum feløgunum, sum veruliga trýr uppá, at tað finst nógv olja og gass goymt í undirgrundini á øllum Atlantsmótinum tvs. bæði á tí bretska og tí føroyska landgrunninum. Herfyri skoraði felagið bingo, tá tað fekk nógv nýggj leitiloyvi í bretskum øki. Har er tað við í tilsamans 13 loyvum, og við 2. útbjóðing í Føroyum hevur felagið økt sín lut her til 5 loyvi. Dong hevur fingið tillutað tvey nýggj loyvi á landgrunninum varð kunngjørt á almennum fundi á Hotel Føroyum mánadagin seinnapart. Í øðrum loyvinum er Dong saman við ChevronTexaco, Statoil og OMV og í hinum saman við Statoil, Shell og Føroya Kolvetni.

Søren Gath Hansen, leitistjóri hjá DONG er sera fegin um tillutanina. –Eg eri fegin um, at vit júst í 2. rundu í Føroyum hava kunnað økt um okkara núverandi virksemi á landgrunninum. Vit hava eina langsiktaða strategi fyri økið, har vit fyri stuttum gjørdu eitt týðandi fund – Rosebank/Lochnagar, beint hinumegin markið á bretskum øki. Tí hevur tað havt sera stóran týdning fyri okkum at tryggja okkum økini føroysku megin hetta fundið umframt øki, sum liggja tætt upp at okkara mest áhugaverda loyvi frá 1. rundu. Tillutanin gevur okkum betri fótafesti í einum øki, sum kann gerast eitt tað týdningarmesta fyri framleiðslu av olju og gassi í Europa sigur Søren Gath Hansen.



*Søren Gath Hansen, stjóri í DONG: -Vit eru sera væl nøgd við loyvini vit hava fingið á landgrunninum*




*Pakkað verður út á Oljufyrisitingini. Her er tað Dave Lewis frá ChevronTexaco, sum er komin við spennandi umsóknini til økið beint við markið, har sama felags hevur gjørt eitt stórt oljufund í bretska økinum. Sigurð í Jákupsstovu stjóri í Oljufyristingini fegnast um, at eitt nýtt stórt oljufelag er við í 2. útbjóðing. Tilhøgru Dave Ellis frá Statoil*
*Mynd Jan Müller*

# ChevronTexaco góðar vónir til Fø

-Vit eru sera væl nøgdir við at hava fingið tað loyvið vit søktu um. Nú verður farið at gera kanningar báðumegin markið og kanningarstjórin hjá ChevronTexaco útilokar ikki, at fer tað at ganga væl við avmarkingarbrunnum í Rosbankøkinum í summar og seismiskum kanningum við á føroyaøkinum, so kann borast á landgrunninum um nøkur ár

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

- Vit eru sera fegnir um at hava verið við í 2. Útbjóðing og at fáa loyvi, sum vit hava søkt um sigur kanningarstjórin hjá risastóra oljufelagnum ChevronTexaco, Dave Lewis. Felagið søkti um eitt loyvi beint út til markið saman við Statoil, Dong og OMV. –Vit hava júst gjørt eitt oljufund beint hinumegin markið, og tí hóskar tað sera væl inn í okkara arbeiðsskráir og strategi, at vit nú hava fingið tillutað eitt leitiloyvi í hesum økinum. Hetta er so eisini júst tað økið, sum felagið nomineraði, tá føroysku myndugleikarnir bóðu feløgini siga frá, hvørji øki tey hildu áttu at verið við í eini nýggjari útbjóðing. –So vit hava fingið tað vit peikaðu á og tað eru vit sera fegnir um.

ChevronTexaco er sera virkið á øllum Atlantsmótinum og við loyvinum við Føroyar fer felagið eisini fer felagið at leggja uppaftur størri orku í sínar kanningar her. Nýggja loyvi er ein heilt náttúrligur liður í royndunum hjá felagnum at fáa eitt betri innlit í og yvirlit yvir alt hetta stóra økið. Felagið, sum arbeiðir kring alla verðina, hevur kjósað sær Atlantsmótið sum eitt av sínum kjarnuøkjum.

Helvtin av felagnum er annars ein gamal kenningur um okkara leiðir. Táverandi Texaco var eitt av teimum mest virknu feløgunum á Føroyaøkinum í 90-unum, tá fyrstu fyrireikingarnar til oljuleiting vórðu gjørdar. Nú er felagið so við aftur



# OMV nýggjur leikari á Føroyaøkinum



*Wayne Kirk, kanningarleiðari hjá OMV sigur seg vóna, at felagið kann vera við til at finna olju og gass við Føroyar*

*Mynd Jan Müller*

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

Størsta fyritøkan í Eysturríki, oljufelagið OMV er nú vorðin partur av leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum. Tá leitiloyvini vórðu tillutað seinnapartin mánadagin av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í oljumálum, var hetta stutta og sjáldsama navnið nevnt millum tey fyrstu. OMV, sum er sera virkið í bretskum øki, fekk blóð uppá tonnina, tá tað saman við øðrum feløgum gjørdi eitt stórt oljufund í Rosebankøkinum beint uppat føroyska markinum. Feløgini í hesum loyvunum settu seg saman og gjørdu av at royna eydnuna í føroysku 2. Útbjóðingini eisini. Tey søktu um eitt øki, sum liggur beint í nánd av Rosebankfundinum – og fingu tað. Kanningarstjórin hjá OMV, sum hevur verið við í arbeiðinum á føroyaøkinum fyrr í Amerada Hess, Wayne Kirk er sera glaður um tillutanina. –Vit eru sera fegnir um at vera við í leiting við Føroyar fyri fyrstu ferð. Hetta er eisini í tráð við okkara arbeiði í bretskum øki, har vit bæði eru við í framleiðandi oljufeltum og við í loyvum, har leitað verður eftir olju og gassi. Vit síggja stórar møguleikar á landgrunninum.

# royaøkið

hesaferð sum eitt heilt nýtt felag undir heitinum ChevronTexaco. Dave Lewis sigur, at talan er um eitt heilt annað felag.

Tað er ein sannroynd, at loyvi á landgrunninum hóvar ChevronTexaco sera væl. Tað passar sum fótur í hosu inn í tess arbeiðskonsept, nú tað hevur gjørt eitt fund beint hinumegin markið. Eitt fund, sum letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum á Atlantsmótinum. Tað vísir seg at løgini báðumegin markið eru tey somu, og tí er rættiliga sannlíkt, at møguleikarnir eru góðir fyri at gera líknandi fund føroysku megin markið.

Ætlanin er at bora fleiri avmarkingarbrunnar í summar. Leitað verður eftir boripalli í løtuni. Ætlanin er so eisini at skjóta nýggjan seismikk í loyvunum báðumegin markið sigur Dave Lewis. Við nýggjum seismikki yvir bæði loyvini fer at vera lættari at fáa eina heildarmynd av jarðfrøðini í undirgrundini í nettupp hesum økinum.

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at oljukeldan í bretska økinum heldur fram yvir í føroyskt øki sigur Dave Lewis, at tað ber ikki til at siga enn, men teir halda seg síggja, at jarðfrøðin er tann sama. – Vónandi kunnu vit við avmarkingarbrunnum í Rosebank í summar siga meira um møguleikan fyri at ein virkin oljuskipan heldur fram yvir í føroyska økið. Kunnu vit finna prógv fyri tí kann hetta koma at skunda undir kanningarnar á føroyska økinum, soleiðis at vit kunnu fara undir eitt rættiliga miðvíst arbeiðsprogram í hesum árinum yvir loyvini báðumegin markið.

Uppá fyrispurning nær ein brunnur verður boraður í føroyskum øki sigur Dave Lewis, at tað veldst um, hvussu gongur við avmarkingarbrunnunum í Rosebankøkinum. Hann útilokar ikki, at brunnur kann verða boraður í 2007 ella 8, men tá skal tað so ganga væl allan vegin.

Dave Lewis sigur, at teir fara liva upp til føroysku ynskini at brúka føroysk tænastur í sambandi við komandi kanningar, har tørvur verður á tí.



# OMV nýggjur leikari á Føroyaøkinum



*Wayne Kirk, kanningarleiðari hjá OMV sigur seg vóna, at felagið kann vera við til at finna olju og gass við Føroyar*

*Mynd Jan Müller*

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

Største fyritøkan í Eysturríki, oljufelagið OMV er nú vorðin partur av leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum. Tá leitiloyvini vórðu tillutað seinnapartin mánadagin av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í oljumálum, var hetta stutta og sjáldsama navnið nevnt millum tey fyrstu. OMV, sum er sera virkið í bretskum øki, fekk blóð uppá tonnina, tá tað saman við øðrum feløgum gjørdi eitt stórt oljufund í Rosebankøkinum beint uppat føroyska markinum. Feløgini í hesum loyvunum settu seg saman og gjørdu av at royna eydnuna í føroysku 2. Útbjóðingini eisini. Tey søktu um eitt øki, sum liggur beint í nánd av Rosebankfundinum – og fingu tað. Kanningarstjórin hjá OMV, sum hevur verið við í arbeiðinum á føroyaøkinum fyrr í Amerada Hess, Wayne Kirk er sera glaður um tillutanina. –Vit eru sera fegnir um at vera við í leiting við Føroyar fyri fyrstu ferð. Hetta er eisini í tráð við okkara arbeiði í bretskum øki, har vit bæði eru við í framleiðandi oljufeltum og við í loyvum, har leitað verður eftir olju og gassi. Vit síggja stórar møguleikar á landgrunninum.

# roya økið

hesaferð sum eitt heilt nýtt felag undir heitinum ChevronTexaco. Dave Lewis sigur, at talan er um eitt heilt annað felag.

Tað er ein sannroynd, at loyvi á landgrunninum hóvar ChevronTexaco sera væl. Tað passar sum fótur í hosu inn í tess arbeiðskonsept, nú tað hevur gjørt eitt fund beint hinumegin markið. Eitt fund, sum letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum á Atlantsmótinum. Tað vísir seg at løgini báðumegin markið eru tey somu, og tí er rættiliga sannlíkt, at møguleikarnir eru góðir fyri at gera líknandi fund føroysku megin markið.

Ætlanin er at bora fleiri avmarkingarbrunnar í summar. Leitað verður eftir boripalli í løtuni. Ætlanin er so eisini at skjóta nýggjan seismikk í loyvunum báðumegin markið sigur Dave Lewis. Við nýggjum seismikki yvir bæði loyvini fer at vera lættari at fáa eina heildarmynd av jarðfrøðini í undirgrundini í nettupp hesum økinum.

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at oljukeldan í bretska økinum heldur fram yvir í føroyskt øki sigur Dave Lewis, at tað ber ikki til at siga enn, men teir halda seg síggja, at jarðfrøðin er tann sama. – Vónandi kunnu vit við avmarkingarbrunnum í Rosebank í summar siga meira um møguleikan fyri at ein virkin oljuskipan heldur fram yvir í føroyska økið. Kunnu vit finna prógv fyri tí kann hetta koma at skunda undir kanningarnar á føroyska økinum, soleiðis at vit kunnu fara undir eitt rættiliga miðvíst arbeiðsprogram í hesum árinum yvir loyvini báðumegin markið.

Uppá fyrispurning nær ein brunnur verður boraður í føroyskum øki sigur Dave Lewis, at tað veldst um, hvussu gongur við avmarkingarbrunnunum í Rosebankøkinum. Hann útilokar ikki, at brunnur kann verða boraður í 2007 ella 8, men tá skal tað so ganga væl allan vegin.

Dave Lewis sigur, at teir fara liva upp til føroysku ynskini at brúka føroysk tænastur í sambandi við komandi kanningar, har tørvur verður á tí.

# Eyðun og oljuævintýrið

**Hann var ein av teimum fáu, sum slapp at vera við millum teir stóru – á marglætishotellum millum veruligar oljusjeikar í avgerandi samráðingum á hægsta stigi. Fyrrverandi oljumálaráðharrin, Eyðun Elttør lítur aftur um bak og minnist eitt tað mest kollveltandi tíðarskeiðið í føroyskari vinnusøgu, sum tað sá út aftanfyri leiktjøldini, og sum tað upplivdist persónliga**

SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Um eg varð bjóðaður sama møguleika í morgin, hevði eg heldur enn fegin tikið av, sigur fyrrverandi oljumálaráðharrin, Eyðun Elttør*

*Mynd: :Jens Kristian Vang*

Tá Oljuráðstevnan byrjar í Norðurlandahúsinum í dag, verður tað ikki, sum vanligt, Eyðun Elttør oljumálaráðharri, sum setur stevnuna. Men hann verður uttan iva at síggja millum fremstu áhoyrarnar, tí hóast starvið sum oljumálaráðharri ikki er til longur, er áhugin hjá Eyðuni fyri hesum økinum óbroyttur.

- Eg varð ofta spurdur, um tað ikki var ein sannur lætti at sleppa úr leiklutinum sum oljumálaráðharri. Men nei. Soleiðis kendi eg tað avgjørt ikki. Og kom onkur og bjóðaði mær sama møguleika í morgin, hevði eg heldur enn fegin tikið av, sigur Eyðun avgjørdur.

## Horvna andlitið úteftir

Eyðun dylur ikki yvir, at tað harmar hann, at oljumálaráðið varð niðurlagt. At siga annað hevði verið løgið, heldur Eyðun, sum sjálvur var við til at seta ráðið á stovn í 1999, eyðsæð tí tað tá var mett at vera ein skilagóð avgerð. Fyri framman bíðaði ein tíð, har føroyska tjóðin skuldi gera sær sínar fyrstu royndir á oljuøkinum í altjóða høpi, og tí varð stór orka løgd í at byggja upp ein stovn, sum skuldi tryggja okkum eina so virðiliga umboðan úteftir, sum gjørligt.

- Eg eri framvegis sannførdur um, at tað eydnaðist, og at tað ikki minst var oljumálaráðnum fyri at takka, at vit komu so væl frá byrjan, sum vit gjørdu. Við ráðnum megnaðu vit at savna eina rúgvu av vitan, innliti og royndum frá ymsum økjum í einum stovni. Eg sigi ikki, at hendan vitan er farin fyri skeytið, nú hon ikki er savnað í Oljumálaráðnum longur, men andlitið út eftir er ikki tað sama. Og tað kann vísa seg at vera sera óheppið fyri okkara framtíðar leiklut í altjóða oljuvinnuhøpi, sigur Eyðun, sum kortini ikki er ein beiskur maður í dag. Hann leggur dent á, at hann hevur alla virðing fyri, at eitt og hvørt landsstýri skipar seg, sum tað heldur vera skilabest.

- Tað førir sjáldan nakað gott við sær, at útiloka øllum øðrum framferðarháttum enn tínum egna. Nú eiga vit at lata nýggju skipanina fáa ein kjans. Tíðin fer nokk at vísa, hvat var rættast, og tá ræður um at vera opin fyri at umhugsa støðuna av nýggjum, um neyðugt, sigur Eyðun.



*Eyðun á vitjan í Alaska. Her saman við fíggjarmálaráðharranum, Karsten Hansen*

## Marknatrætan

Eitt afturvendandi kjakevni frá tíðini, Eyðun sat sum oljumálaráðharri, er avtalan um landgrunnsmarkið, sum føroyingar gjørdu við bretar í 1999. Tað er ongin loyna, at leiðandi partar av landsstýrinum undan fullveldissamgonguni hildu, at føroyingar áttu at havt bíða, tí bretar vóru meir kroystir, enn vit. Til hetta sigur Eyðun, at tað ofta tykist sum faktiska gongdin i hesum málinum verður gloymd, tí bretar jú slakaðu á heysti 1998, júst tí teir høvdu størri skund, enn vit. Hann minnir á, at tá landsstýrið legði frá sær á vári 1998 stóð í botni og framstigini í samráðingunum høvdu verið fá og smá.

- Vit settu okkum fyri at loysa máli. Á sumri 1998 gjørdi eg bretska orkumálaráðharranum, John Battle, greitt, at teirra krøv vóru burtur úr vón og viti, og at vit ikki høvdu serligan skund, tí vit onga oljuvinnu høvdu, sum stóð og pikkaði uppá dyrnar. Hvørja ávirkan henda samrøðan hevði, er sjálvandi ilt at meta um, men tað er ein sannroynd, at fyrstu signalini, um at bretar vóru við at ganga burtur frá sínum víðgongdu krøvum, komu í september sama árið, og í mai 1999 varð endaliga avtalan undirskrivað.

Sum kunnugt fingu vit eitt reint miðlinjumark millum Føroyar og Hetland, meðan markið í gráa økinum frá "gullhorninum" og vestur eftir á einum strekki liggur nakað nærri Føroyum, enn Bretlandi. Eyðun vísir á, at talan kortini er um miðlinjumark, og at hetta samsvarar væl við landafrøðiligu umstøðurnar og niðurstøður, ið altjóða dómstólurin hevur gjørt í øðrum líknandi málum.

- Higartil er eingin lønandi oljuleið funnin á hesi leið, men sjálvandi kann tað henda. Tað mugu vit so liva við. Nýggjastu oljuleiðirnar, ið eru funnar bretsku megin markið, liggja á leiðum, sum Føroyar ikki settu fram krav um - og heldur ikki eftir altjóða rætti høvdu fingið, sigur Eyðun og leggur afturat, at leiðsla er at taka avgerðir undir givnum umstøðum, og tora at taka avleiðingarnar. Hann heldur, at í marknamálinum er alt ov nógv ført fram, sum bendir á, at politiska leiðslan í Føroyum eitt skiftið ræddist at taka avgerð, tí eftirtíðin kundi jú prógva, at bretar fingu eina betri avtalu enn vit.

- Henda tankagongdin førir jú ongan veg. Anfinn Kallsberg vísti sonn leiðsluevni í marknatrætuni. Hann loysti málið, og

meira er ikki at siga um tað, staðfestir Eyðun.

## Oljuhavn og oljufelag

Eitt annað mál, sum elvdi til nógv kjak, var spurningurin um, hvørt eitt alment oljufelag átti at verið sett á stovn. Men Eyðun er framvegis fullkomiliga sannførdur um, at tað var rætt, tá hann gjørdi av ikki at seta á stovn eitt alment oljufelag ella krevja eina sokallaða optión í loyvistreytunum.

- Føroyskir myndugleikar eiga tíverri alt ov nógv vinnulív, serliga umvegis almennar grunnar, men tað er ógvuliga lítið, sum bendir á, at hetta hevur verið tað stóra vælsignilsið fyri land og fólk, sigur Eyðun og leggur afturat, at almen oljufeløg eru eitt 60'ara og 70'ara fyribrigdi, sum øll oljulond eru á veg burtur frá. Hann trýr heldur ikki uppá, at vanligi føroyingurin hevðu fingið størri lut í oljuríkdøminum, um tað almenna átti eitt oljufelag ella eina optión.

- Er vanligi norðmaðurin vorðin ríkari privat, tí Statoil varð selt ella ei? Sjálvandi ikki. Norðmenn fáa ágóðarnar av at liva í einum ríkum samfelag, men teir fáa ikki oljumilliónir inn á sína privatu kontu. Politikkarar eiga at ansa eftir ikki at geva fólki falskar vónir. Um landsins ríkidømi verður fingið til vega við skatti, avgjaldi ella sølu av partabrøvum kann fyri so vítt gera tað sama. Tað verður altíð ein sjálvstøðugur politiskur spurningur at býta landsins ríkidømi.

Sum kunnugt, gjørdi oljumálaráðharrin eisini av, at politiski mynduleikin ikki fór at leggja seg út í, hvar útgerðarstøðin varð plaserað. Eitt ávíst trýst stóðst av hesum, tí fleiri politikkarar vildu hava, at man frá politiskari síðu ásetti, at útgerðarstøðin skuldi liggja í Suðuroy.

- Feløg úr Suðuroynni høvdu sama møguleika, sum aðrir, at bjóða seg fram, men tíverri fyri teir, gjørdust teir ov stuttir. Kolvetnislógin og loyvistreytirnar loyva, at støða verður tikin til henda spurningin av nýggjum, tá og um olju verður funnin í lønandi nøgdum. Persónliga haldi eg, at politikkarar eiga at vera varnir við at leggja seg ov nógv út í hesi viðurskiftini. Tænastuveiting til møguligar oljuleiðir eigur ikki at verða ásett eftir, um arbeiðsloysi er í einum øki ella ikki. Tað avgerandi er ikki, hvar útgerðarstøðin verður plaserað, men hvussu dugnaligir føroyingar og føroyskar fyritøkur eru til at fáa lut í veitingunum.



*Eyðun Eltør letur fyrstu loyvini til leiting í 2000*

## "Menniskjað, maskinmaðurin og ministarin"

Hóast umstríddar avgerðir, sum hesar, vóru partur av starvinum sum oljumálaráðharri, káma tær ikki minnini, Eyðun hevur, um tey ríku upplivilsi, sum eisini myndaðu hetta tíðarskeiðið fyri hann persónliga.

- Tað er sjálvandi forkunnugt at sita ímillum heimskendar uttanríkisella orkuráðharrar, har ófatiligar pengauppahæddir verða nevndar mestsum bara hissini í einum at síggja til ovurhonds fløktum politiskum spæli. Men spælið er ongantíð fløktari, enn at tað nirðiundir altíð goyma seg vanlig og vinsæl menniskju. Og góðu prátini og hugnaligu løturnar saman við teimum vóru ofta minst líka ógloymandi, sum alt hóvastákið, sigur Eyðun og nevnir eina hending á einum norskum boripalli, hann minnist serliga væl.

- Vitjanir á boripallum høvdu altíð mín stóra fakliga áhuga, so eg var komin í prát við ein av maskinmonnunum um tað, hann stóð og gjørdi. Sjálvandi, tað var jú stak áhugavert, men á veg av aftur pallinum hugdi ein norðmaður, sum hevði víst okkum runt, uppá meg og segði: Hasin maskinmaðurin fer aldrin í lívinum at gloyma ta ferðina, ein oljuministari steðgaði á og gav sær stundir at tosa við seg. Eg mátti bara smílast og hugsaði við mær sjálvum, at kanska var eg sjálvur meir maskinmaður enn ministari hasa løtuna, flennir Eyðun

## Sum ein dreymur

At sessurin sum oljumálaráðharri hvarv, næstan líka brádliga, sum hann kom, er fyri Eyðun bert enn eitt gott dømi um, at í politikki kann alt henda. Eisini at ein púra vanligur maskinmeistari úr Klaksvík frá eini løtu til aðra gjørdist ein av lyklapersónunm í størstu avbjóðingini á vinnuøkinum Føroyar nakrantíð hava staðið í. Men hóast Eyðun var púra ókendur sum politikari, ivaðist hann ongantíð í at taka av, tá hann fekk boðið sessin sum landsstýrismaður í oljumálum.

- Eg havi altíð verið sannførdur um, at ert tú erligur og opin fyri nýggjari vitan og góðum ráðum, kanst tú læra ótrúliga nógv eftir stuttari tíð. Tíðin sum oljumálaráðharri hevur verið ein tann læruríkasta í mínum lívi, og tað er fyrst av øllum mínum starvsfeløgum í ráðnum fyri at takka. Ikki minst aðalstjóranum, Herolvi Joensen, sum eisini gjørdist mín góði vinur. Á hvør sínum øki høvdu hesi fólkini ómetaliga stóra vitan og drúgvar royndir, og í felag brutu vit upp úr nýggjum, tí onki av hesum var roynt á sama hátt í Føroyum fyrr, sigur Eyðun og leggur afturat, at eisini menniskjaliga vóru tey í eini støðu, sum sannliga kravdi sín mann ella kvinnu, fyri at halda eldhuganum uppi.

- Vit hava framvegis ikki funnið olju í rakstrarverdum nøgdum, so eyðvitað vóru tað løtur, har sjálvt tann mest ágrýtni mundi ivast í, um nakað nakrantíð fór at spyrjast burtúr øllum arbeiðinum, sum varð lagt í hvønn dag. Slíkt krevur nakrar menniskjaliga eginleikar, sum tú ikki bara kanst taka sum eina sjálvfylgju.

Eyðun Elttør er nú aftur í sínum gamla starvi á arbeiðseftirlitinum millum sínar gomlu starvsfelagaðar, har hann trívist væl. Men hóast tað nú er liðið eitt ár síðani, hann fór úr sessinum sum oljumálaráðharri, viðgongur hann, at tað framvegis kennist løgið og tómt ikki at vera við í hesum arbeiðinum longur.

- Hetta var jú ikki bara eitt starv. Fyri meg var hetta ein heilt øðrvísi lívstílur, har arbeiðið fylti alt døgnið. Í dag tykist tað næstan veruleikafjart, eitt sindur sum at vakna úr einum dreymi – men spennandi var tað, eitt upplivilsi, eg avgjørt ikki vildi verið fyri uttan, sigur fyrrverandi oljumálaráðharrin at enda.



*Eyðun á eini av mongu ferðum sínum sum oljumálaráðharri*

# Oljuvinnan ein prístilvitað vinna

**Oilwind hevur í mong ár havt virksemi innan oljuvinnu, men royndirnar eru, at henda vinna er sera tilvitað um prís og lagar seg skjótt eftir umstøðunum. Tí gongur skjótt upp og niður við virkseminum, eins og í øðrum vinnum. Jákup Joensen, stjóri, sigur, at fyri teirra viðkomandi hava ráðstevnur, messur, ikki givið so nógv ítøkiligt, men neyðugt er tó at dagføra seg**

VINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað er so langt síðani, at farið var undir at prátað um oljuvinnu og at vit skuldu við í hesa vinnu.

- Eg var við í einum arbeiðsbólki í Vágum fyri mongum árum síðani, minnist Jákup Joensen, stjóri í Oilwind í Miðvági, sum í mong ár hevur havt nógvar mans í oljuvinnuvirksemi í Noreg.

- Men í 1997 fingu vit samband við eitt felag í Noreg og fingu samstarv. Vit skuldu menna ymsar skipanir á boripallum, tí m.a. skuldi vinnan rationaliserast. Hetta helt á støðugt til ár 2000 og vit høvdu nógvar mans úti, sigur Jákup Joensen.

Síðani fullu oljuprísirnir.

- Feløgini skóru útreiðslurnar niður beinanvegin og síðani august 2000 var manningin heima. Men síðani í fjør einaferð, tá oljuprísurin aftur fór upp, hevur virksemi aftur verið. Oljuvinnan er ein vinna, sum er sera tilvitað um prís, so virksemið er ymsikt og tað svingar og er ójavnt, eins og í øðrum vinnum, sigur Jákup Joensen.

### Krøv

Oilwind hevur eisini havt onkra uppgávu fyri Amerada Hess í samband við útbjóðingarumfar í Føroyum.

Men Jákup Joensen ásannaði, at krøvini eru sera høg, skal ein vera við.

- Millum annað var eitt krav, at vit høvdu persóntryggingar upp til einar 60 milliónir. Men vit kannaðu ymisk viðurskifti og funnu útav hvussu vit stóðu, hvar vit vóru veikur og so framvegis. Vit lótu tó eitt tilboð inn og fingu eina uppgávu og ein onnur føroysk fyritøka fekk aðra uppgvávu, sigur Jákup Joensen.

- Tað verður neyvan nakað veruligt virksemi her heima hjá okkum, fyrr enn vit kunnu vísa á, at olja er í føroysku undirgrundini. Til tað er hent, verður tað kanska mest av vælvild, at okkurt stingur seg upp, havi eg varhugan av, metir Jákup Joensen, ið kann sigast eisini at tala av royndum.



*Í Føroyum eru tey mest kend fyri snellurnar, men Oilwind hevur eisini onnur bein at standa á*

### Nýtt innan línu

Jákup Joensen sigur, at vit mugu minnast, at vit eru lítið land og eru fáment. Hetta sigur hann av royndum, tí tað hendir, at okkurt stingur seg upp, ið krevur nógvar mans, men tá er arbeiðsorkan ikki tøk.

Hann heldur, at tá talan er um føroyskt virksemi innan oljuvinnu, so er tað helst so, at vit mugu finna okkum onkra "nichu", har vit kunnu gera okkum galdandi.

- Vit hava roynt at arbeit í tí stilla, m.a. í Noreg, men annars er Oilwind eitt virki, sum alla tíðina lagar seg eftir umstøðunum. Men eg kann nevna, at vit júst hava ment nýggja vøru í samband við línufiskiskap. Hetta er ment við stuðli frá BP, og tí hevur verið møguligt at bera so í bandi, at vøran longu er liðug. Men vit eru eitt virki, sum brúkar nógvan pening til menning av nýggjum vørum, sigur Jákup Joensen.

Tað er ikki so at skilja, at hann hevur nakað ímóti messum og ráðstevnum, men hann ásannar, at fyri teirra viðkomandi er ikki so nógv ítøkiligt komið burturúr slíkum tiltøkum.

– Men vit møta helst upp til slík tiltøk og hetta er eisini ein sera kærkomin møguleiki at dagføra seg, sigur stjórin í Oilwind, nú Offshore Faroes 2005 fer av bakkastokki.

# Nýtt skip til Vágs



*Ran kom á Vág sunnudagin og fór sama dag royndartúr*

**Sunnudagin kom Ran á Vág. Vágbingar og aðrir hava keypt skipið, sum fór royndartúr sunnudagin**

SKIP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nógvar eru døpru søgurnar úr Suðuroynni fyri tíðina, men onkur sólstrála er tó at hóma av og á.

Ran kallast nýggjasta skipið, sum hoyrir heima í Vági. Hetta er gamli Enniberg og Ljósafelli.Sunnudagin kom skipið á Vág og fór síðani royndartúr undir Føroyum fyri at royna reiðskapin.

Nógvar ábøtur eru millum ár og dag gjørdar á skipið, sum tí er í sera góðum standi, hóast árini eru mong.

Ran er 55 metrar langur, 11 metrar breiður og er eini 300 tons.

Júst hvar skipið fer at royna er ikki heilt avgjørt, men skipið hevur ikki fasta kvotu. Manningin á Ran er blandað og kemur úr øllum landinum.

Teir, ið nú eiga skipið, eru brøðurnir Mikkjal og Heri Godtfred í Vági, Pól Patursson, Kirkjubø, Klæmint Olsen, Sandur, Hans Andreas Joensen, Hósvík og Símun Einarsson, Lambi.

# Mugu vita hvønn veg rákið fer

**Menningarstovan verður umboða á Offshore Faroes 2005. Kjartan Kristiansen, stjóri, sigur, at Menningarstovan má fylgja við hvønn rákið fer. Hann metir fleiri spennandi fyrilestrahaldarar eru á skránni**

VINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

– Tað er altíð áhugavert at vita, hvat kann spyrjast burturúr oljuvinnu. Hetta er áhugavert fyri føroyska vinnu og hevur eisini týdning og er áhugavert fyri aðrar vinnur, enn júst oljuvinnu, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni.

Annars metir hann tað hevur týdning fyri Menningarstovuna at fylgja við í, hvønn veg rákið fer. Bæði aðratstaðni og her heima.

### Spennandi fyrilestrar

Hann er spentur uppá fyrilestrarnar, serliga íslendsku og norsku fyrilestrahaldararnar, tí hann hevur upplivað onkran av hesum áður, og teir eru áhugaverdir og hava áhugaverd sjónarmið.

Hann sigur, at Menningarstovan má kanna og fylgja við, hvønn veg rákið fer og kanska eisini ávara viðhvørt. Men annars er upgávan yvir fyri politiska myndugleikanum at fylgja við, og jú fleiri eru um at meta um, tess betri gerst úrlitið.

### Kreativa vinnan

Kjartan Kristiansen sigur, at spennandi er eisini at vita, hvussu kreativa vinnan í Føroyum ávirkast. Tí sera nógv hendir innan hesa vinnu í Føroyum í hesum døgum.

Spennandi er at vita, hvussu oljuvinna og fiskivinna ávirka tey og hvussu hetta sæst aftur týsdeagin, so eg eri sera spentur uppá Offshore Faroes 2005, sigur Kjartan Kristiansen.

# Føroya Kolvetni fer nýggjar leiðir

**2. ÚTBJÓÐING**

*Jan Müller*

Eisini føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni er sera væl nøgt við teigarnar, sum Oljufyrisitingin hevur tillutað felagnum í 2. útbjóðing. – Vit hava fingið tað, sum vit søktu um, og tí kunnu vit bara vera nøgd sigur Nils Sørensen, stjóri. Felagið er við í tveimum loyvum, sum fevna um 16 heilar teigar og 3 partsteigar ella tilsamans 3500 ferkm.

Í øðrum loyvinum er Føroya Kolvetni saman við Statoil, Shell og Dong. Hetta loyvi liggur miðskeiðis á landgrunninum rættiliga tætt landi. Føroya Kolvetni hevur 10% lut í hesum loyvinum. Síðani hevur felagið fingið eitt loyvi suðuri ímóti markinum, har tað er heilt einsamalt. Hetta loyvi, 012 og sum hevur fingið heitið "Rannvá" er rættiliga serstakt, nú tað liggur í einum heilt nýggjum øki, har loyvi ikki eru latin áður. Nils Sørensen sigur, at hóast her er talan um høgan váða, so er hetta kortini eitt øki, sum nógvir jarðfrøðingar hyggja við stórum eygum at. Her er nevniliga talan um eitt ókent øki, sum kann goyma onkrum heilt stórum. Loyvið liggur á tí sokallaða Wyville-Thomson rygginum og fevnir um 1000 ferkm. Tað er á 500 metra dýpi.

Felagið Fugro hevur skotið seismikk í økinum og er ætlanin at fáa meira seismikk til vega í hesum økinum. Strukturar síggjast í undirgrundini. Her er annars talan um tann størsta ryggin í Norðurvesturevropa, har eingin hevur borað áður.

Uppá fyrispurning um hví teir eru einsamallir í hesum heldur fjarskotna økinum sigur Nils Sørensen, at teir longu undir normeringini av økjum peikaðu á júst henda partin av landgrunninum, sum eitt spennandi stað at leita eftir olju. – Hetta økið er kanska eitt sindur øðrvísi enn hini. Hetta er nokk ein av dreymunum hjá øllum jarðfrøðingum at arbeiða í. Í dag arbeiða roynd útlendsk oljufólk hjá Føroya Kolvetni í Bretlandi, eitt nú fólk við drúgvum royndum frá oljufeløgum sum Lasmo og Conoco. Fyri tey er loyvið, sum felagið hevur fingið har suðuri, sera kærkomið, tí tað er spennandi og ókent.



*Nils Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni er sera fegin um útbjóðingina*

Við hesum báðum loyvunum hevur Føroya Kolvetni tilsamans 10 loyvi á Atlantsmótinum. Øll eru sokallað "high risk" øki. Nils Sørensen sigur, at teir eru ikki minst væl nøgdir við at vera partur av einum sum hann málber seg "knasandi" sterkum bólki saman við Statoil, Shell og Dong. Hann heldur fyri, at hetta verður ein sera seigur bólkur, tá talan er um Atlantsmótið og vísir á, at Statoil hevur víst seg veruliga at vilja nakað á mótinum. Shell er eisini við í nógvum loyvum, og havast skal eisini í huga, at felagið hevur yvirtikið Enterprise, sum var við í loyvum í 1. útbjóðing. Dong hevur so víst seg at leggja størri og størri orku í alt økið eisini.

Føroya Kolvetni hevur sítt høvuðssæti í Aberdeen, har fleiri føroyingar og bretar arbeiða. Kjarnin eru føroyingar. Á skrivstovuni eru umleið 7 fólk. Annars keypir felagið sær nógva ráðgeving frá øðrum.



# Loyvini í 2. útbjóðing




*Á kortinum frá Oljufyrisitingini síggjast tey sjey nýggju loyvini. Blái liturin fevnir um tey øki í 2. útbjóðing, sum eingin hevur bjóðað uppá*



# Enn langt á mál

Við 2. útbjóðing er enn einaferð settur skjøtil á oljuleiting á landgrunninum. Ein áhugaverd og spennandi tíð er fyri framman. Enn ber so ikki til at vísa á tey stóru úrslitini, so henda myndin svarar væl til tað, sum er funnið av olju higartil. Upp í lógvan av olju er alt. Men vónirnar um komandi oljufund eru til steðar hjá teimum mongu oljufeløgunum, ið eru virkin á Føroyaøkinum

# Alt virksemið á Atlantsmótinum




**Á hesum kortinum, sum júst er gjørt, síggja vit øll loyvini á Atlantsmótinum tvs. bæði á bretskum og føroyskum øki.**









LICENSED ACREAGE
FAROE PETROLEUM PLC

Faroe Acerage · UK Acerage · Oil Fields · Gas Fields · Gas Pipeline

Føroyar: Føroya Kolvetni P/F · Bryggjubakki 22 · P.O. Box 1098
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel: +298 320 450 · Fax: +298 320 451

Bretland: Faroe Petroleum plc · 24 Carden Place · Aberdeen · AB10 1UQ
Tel: +44 1224 652 810 (switchboard) · Fax: +44 1224 643 243

e-mail: faroe-petroleum@faroe-petroleum.com · www.faroe-petroleum.com

Faroe Petroleum

# Alternativar vinnur á dagsskránna

**Oljuvinna og framhaldandi vælferð Føroya. Hetta verða tey bæði høvusðevnini á árligu oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum týsdagin. - Alternativar vinnur skulu á dagsskránna, sigur Malan Johansen, samskipari úr Vinnuhúsinum**

OLJURÁÐSTEVNA
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Seinastu tíðina hevur Malan Johansen úr Vinnuhúsinum havt úr at gera við at samskipa stóru oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum, sum byrjar týsmorgunin. Líka síðani oljuleitingin byrjaði í føroyska havøkinum, hevur oljuráðstevnan verið eitt afturvendandi tiltak.

## Oljan fyrst

Malan Johansen greiðir frá, at endamálið við tiltakinum hesaferð er fyrst at viðgera oljuvinnuna, og við støði í vælferðarspurninginum verður síðani viðgjørt, hvussu vit kunnu skapa alternativar vinnumøguleikar í einum einstáttaðum fiskivinnubúskapi.

- Ráðstevnan er býtt upp í tveir partar. Fyrst verður oljuvinnan umrødd, og eftir døgverða er yvirornaða evnið, hvussu vit kunnu tryggja framhaldandi vælferð Føroya, sigur Malan Johansen.

Sigurð Poulsen, stjóri á oljufyrisitingini, fer fyrst at greiða frá aðru loyvisrundu á føroyska økinum, og síðani koma tvey umboð frá oljufeløgunum Statoil og Chevron Texaco at greiða frá møguleikum og virksemi á Atlantsmótinum. Wilhelm Petersen, stjóri á á Atlantic Petroleum, og Graham Stuart, stjóri á Føroya Kolvetni, fara so at greiða frá sínum virksemi í Bretlandi, áðrenn Regin Hammer frá FOÍB og Petur Joensen frá oljufyrisitingini skulu greiða frá, hvussu peningurin til førleikamenning er nýttur, og hvørji úrslitini eru.



*- Spurt verður, hvussu vælferðin kann tryggast, um t.d. fiskivinnan svíkur, og við øðrum orðum verður ljós kastað á alternativar vinnumøguleikar, sum kunnu veita føroysku tjóðini fleiri búskaparlig bein at standa á, sigur Malan Johansen úr Vinnuhúsinum undan árligu oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum týsdagin*

## Vælferð Føroya

Spurningurin um framhaldandi vælferð Føroya verður yvirornaða evnið á seinna partinum av stevnuni.

- Spurt verður, hvussu vælferðin kann tryggjast um t.d. fiskivinnan svíkur, og við øðrum orðum verður ljós kastað á alternativar vinnumøguleikar, sum kunnu veita føroysku tjóðini fleiri búskaparlig bein at standa á, sigur Malan Johansen úr Vinnuhúsinum.

Malan vísir á, at eisini her eru fleiri fyrilestrar á skránni bæði hjá føroyingum og útlendingum. Fyrst fer íslendskur professari at greiða frá, hvussu íslendingar hava megnað at gjørt eitt meiri fjølbroytt vinnulív til veruleika, sum ikki longur bert er tengt at fiskivinnuni, og síðani fer norskur professari at hugleiða um samfeløg, sum eru tengd at tilfeingisbúskapi.

Johnny í Grótinum frá Føroya Sparikassa, Zvonko Mrdalo av Hagstovu Føroya og Ólavur Gregersen, stjóri á Bitland, fara síðani at viðgera spurningar, sum eru viðkomandi fyri vælferð Føroya, áðrenn Magni Arge, stjóri í Oljuvinnufelagnum, tekur samanum.

# Vinnuhúsið flutt niðan í Smærugøtu

**Eftir at hava leitað eftir hølum í mong ár er Vinnuhúsið nú flutt úr R.C. Effersøesgøtu niðan í Smærugøtu í Havn. Men í Vinnuhúsinum hugsa tey meiri um oljuráðstevnuna týsdagin, sum Jan Mortensen stjóri metir vera alneyðuga í eini myrkari búskaparligari tíð**

FLYTING
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*



*Jan Mortensen í nýggja bygninginum hjá Vinnuhúsinum gleðir seg til oljuráðstevnuna týsdagin, sum hann metir vera alneyðuga í døprum búskaparligum tíðum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey sjey arbeiðsfólkini, sum eru tengd at Vinnuhúsinum, fóru mánamorgunin á fyrsta sinni til arbeiðis í nýggjum hølum. Eftir at hava búleikast niðri í R.C. Effersøesgøtu í mong ár er Vinnuhúsið nú flutt niðan í Smærugøtu í Havn í stór hús, sum í øllum førum havnarfólk kenna aftur sum stóru hvítu húsini uppi á høvdini omanfyri Mylnuna og Berjabrekku.

## Plásstrot

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, greiðir frá, at leingi hevur verið leitað eftir røttu hølunum at flyta í, tí plássið niðri í gomlu húsunum varð sera avmarkað, og flytingin hevur sostatt verið átroðkandi.

- Tosað hevur verið um at byggja, men tá vit nú fingu møguleikan, tóku vit av, og vit eru sjálvsagt fegin um nýggju hølini, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

## Neyðug ráðstevna

Men hóast manningin júst er flutt inn í nýggjan bygning, er uppmerksemi hjá Vinnuhúsinum í hesum døgum kring oljuráðstevnuna týsdagin. Jan Mortensen ætlar sær at fylgja væl við.

- Sum flestum kunnugt hevur føroyska vinnan seinastu tíðina verið merkt av stagnatión, fallandi nøgdum, fallandi prísum og einum horvnum bjartskygni. Tí er alneyðugt við eini ráðstevnu, sum júst viðger spurningin um nýggj initiativ og øðrvísi vinnumøguleikar, sigur Jan Mortensen. Hann metir, at bjartskygdi hugburðin til nýggjar vinnumøguleikar, sum var at hóma eftir kreppuna, er horvin, og tí er neyðugt at skipa fyri tiltøkum, sum aftur kunnu kveikja og seta ferð á vinnuliga nýhugsan.

# Samstarv er loysnin fyri Suður

**Tvøroyrar kommuna er í samráðingum um nýtslu av havnini á Drelnesi. Her eru nógvir møguleikar fyri virksemi, og teir bíða spentir eftir, hvat úrslitið av hesum verður. Hetta kemur ikki bert at gagna Tvøroyri, men allari oynni**

OLJUFRAMTÍÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað er langt millum tey góðu tíðindi, ein hoyrir úr Suðuroynni í hesum døgum. Meinparturin av tíðindunum er merktur av uppgevan, neyð og elendigheit við arbeiðsloysinum, sum einum óhugnaligum leikluti í tíðindaflutninginum.

Mong hava helst mist vónina um at oyggin skal menna seg aftur. Men ikki øll! Ein teirra er Pauli Einarsson, býráðspolitikkari á Tvøroyri.

Hann er ikki samdur við teim døpru røddunum, sum ikki spáa oynni nakra framtíð.

- Vit eiga nógv gott fólk í oynni. Vit eiga eisini fólk, sum eru hugað at gera íløgur. Men tey verða ikki eftirspurd.

- Fyri mær er eingin ivi, um at lata vit tey røttu fólkini sleppa framat - og ikki bara teoretikarum! - so trúgvi eg uppá, at vit fáa nakað upp at standa her í oynni, sigur hann optimistiskur.




*Pauli Einarson: - Nógv halda at Suðuroyggin er sum eitt krígsrakt øki og er í undantaksstøðu. Men her býr gott fólk, sum ikki hevur mist mótið. Og her býr eisini fólk, sum eru sinnaði at gera íløgur*

Tað finnast vinnuligir møguleikar. Ein teirra er oljan, Men tann stóri spurningurin er - og fer at verða: Er Tvøroyri tilbúgvin sum ein komandi oljuhavn?

Vit seta spurningin til Paula Einarsson, sum í býráðnum haraftrat er formaður í teknisku nevnd og limur í Havnanevndini, sum eisini hevur hansara stóra áhuga.

## Ein havn - nógvir møguleikar

Fyri Paula Einarsson er eingin ivi um, Tvøroyri er fult tilbúgvin til at gerast ein komandi oljuhavn í Føroyum.

Hann vísir til alt økið á Drelnesi, har ein í dag hevur millum 20 og 30.000 fermetrar klárar til slíkt virksemi. Av hesum eru longu teir 12.000 fermetrarnir planeraðir.

Men hvør er í roynd og veru "vitsin" við at hava eitt slíkt økið liggjan har uttan virksemi. Hevur Tvøroyrar kommuna nakrar hugsanir um tað, og hvat kann henda har í framtíðini?

- Jú, sigur Pauli Einarsson. Her er nógvir møguleikar, og so avgjørt eisini aðrir møguleikar enn júst ein oljuvinna.

Ella, sum hann tekur til: "Farmur er hóast alt farmur, og farmur kemur altíð at verða skipaður uppá land á Drelnesi og umborð á ymisk skip". Um tað so verða russisk skip ella supply-bátar - so er arbeiðið kortini á leið tað sama. Har er avgjørt pláss fyri báðum tingunum og enn fleiri.

Men eru so nakrar heilt ítøkiligar ætlanir við hesum 30.000 fermetra stóra økinum í løtuni?

- Jú, tað eru onkrir fyrispurningar um nýtslu av hesi havnini í framtíðini. Vit eru í samráðingum um tað beint nú, so tað kann eg ikki upplýsa tær meiri um í løtuni, sigur hann.

*Drelnes kemur í framtíðini at spæla ein týðandi leiklut í menningini av Suðuroynni. Farmur er farmur, og farmur kemur altíð at verða uppskipaður og avskipaður har*



## Samstarv er neyðugt

Í kjalarvørrinum á hópuppsagnunum í Vági og í Hvalba fyri tveimum vikum síðani er tann vinnuliga støðan í Suðuroynni tað, ið mest hevur verið frammi í tjakinum og prátinum manna millum.

Nógv hevur verið tosað um stertar og slíkt, men hvussu við Drelnesi. Kann Drelnes koma at hava ein týðandi leiklut í menningini av Suðuroynni?

Fyri Paula Einarsson er eingin ivi. Hann er sannførdur um, at tað kemur Drelnes at gera. Teir hava eina frálíka havn á Drelnesi og í Vági finst eisini ein góð hann.

- Og soleiðis sum støðan er beint nú, so eru tað ting, tú kanst fáa gjørt her á Tvøroyri og sum tú ikki

# Á djúpum vatni við ongum bargingarringi

**Vit hava oljuna tætt við hjá okkum. Men spurningurin er bara um vit eru tilbúgvin til at gera nakað, um ein vanlukka skuldi hent**

DÁLKING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hesi seinastu árini er skipaferðslan kring oyggjar okkara økt rættiliga nógv. Tað vísir seg, at ruturnar hjá teimum stóru tangabátunum eru fluttar longur norður.

Í dag finnast rættiliga stórur rutur sjóvegis sum fara tætt fram við okkara oyggjum. Og her er m.a. talan um tangabátar við nógvari olju.

Men spurningurin er, um vit eru til reiðar við eini hjálpandi hond, um vanlukkan hendir ein góðan dag?

## Ikki til reiðar

Pauli Einarsson á Tvøroyri tók fyri árum síðani stig til fyritøkuna OSR, sum hevði til endamáls at vera til reiðar um nakað tílíkt skuldi hent.

Tað er tó einn sannroynd, at tað er bara ein evarska lítil partur av dálkingini sum kemur frá sjálvari oljuvinnuni – kanska ikki meiri enn eini trý prosent. Restin kemur frá fiskiskipum og handilsskipum.

Men Pauli er sannførdur um, at vit í løtuni ikki eru før fyri at gera nakað, um ein stór vanlukka skuldi hent. Men hvat er so til ráða at taka?

- Sum er verður bara dúvað uppá at onkur tekur telefonina í hinum endanum í útlandinum og kemur við hjálpini hendavegin.

- Eg vil siga tað, so at vit eru komin út á djúpt vant við oljuni, men vit hava ongan bjargingarring um nakað gongur galið.

- Er tað nøktandi?

- Nei, tað er tað so als ikki. Eg haldi, at støðan skuldi heldur veriðtann øvugta: At tað var soleiðis, at um útlandið hevði brúk fyri hjálp, so kundu vit føroyingar verið til at veitt teimum hesa hjálpina.

- Vit eiga fyrst at kunna hjálpa okkum sjálvum, og síðani kunnu vit fara út til onnur um tey hava brúk fyri hjálp, sigur hann.



# oynna



fært gjørt suðuri í Vági. Og øvugt!

- Í Vági hava teir til dømis fleiri frystihús, og slík hava vit ikki her í sama málistokki. So tí hava vit eitt øgiliga gott grundarlag fyri einum samstarvi í oynni í framtíðini, sigur hann.

## Ein fyri allar

Tvøroyrar kommuna liggur í løtuni í samráðingum um nýtslu av Drelnesi. Tí er ikki lætt at fáa nakað ítøkiliga at vita frá Paula Einarsson um tað.

- Undir slíkum samráðingum, so samráðist ein út frá einum einstøkum staði. Men so skjótt tú fært eina avtalu út frá einum staði, so fert tú út og tekur restina av oynni við. Tí tú klárar tað simpelthen ikki einsamallur.

- Hetta er eisini orsøkin til at tú heldur kortini so tætt inn at kroppinum, sigur hann.

Teir hava samband við vinnulívið runt í oynni, og hinar kommurnar vita eisini hvat teir eru farnir í holt við.

- Men tað er bara tann eina kommunan sum tekur initiativið, so ikki ein tosar í vestur og hini í eystur. Vit koyra stutt sagt eitt forløb beint nú.

- Og tí vilja vit av góðum grundum ikki samráðst gjøgnum bløðini, - tú skilir!



*Pauli Einarson eigur útgerðina til at berja niður eina oljudálking. Men hon verður alt ov lítið brúkt*

# Tey góðu fólkini verða ikki eftirspurd

**- Tað ljóðar sum Suðuroyggin er eitt krígsrakt øki, har alt er í undantaksstøðu. Men vit eiga gott fólk, og eisini fólk sum vilja gera íløgur í vinnuna. Men hesi fólkini verða ikki hoyrd, sigur Pauli Einarsson á Tvøroyri. Hann er bjartskygdur um framtíðina hjá oyggj hansara, hóast mong onnur helst eru um at missa mótið**

VINNUMØGULEIKAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tá tað snýr seg um framtíðina hjá Suðuroynni eru nógvir spurningar frammi. Og nógvir spurningar sum kanska eru truplir at svara í løtuni:

Hevur Suðuroyggin nakran tjans í framtíðini? Er tað møguligt at gera nakað skilagott í oynni? Er tað ikki ov seint?

- Nei, nei, nei. Tað er ikki ovseint. Og Suðuroyggin hevur avgjørt ein møguleika. Vit skulu bara ans eftir, at vit ikki koma sooo langt niður, at tað snøgt sagt er ov seint at gera nakað sum helst, sigur hann.

Hann tekur sum dømi bygdina Mykines, har fólkatalið í dag er so mikið lágt, at tað er sera trupult, fyri ikki at siga ógjørligt, at byggja tað uppaftur.

- Vit í Suðuroynni mugu ansa eftir, at vit ikki koma niður á tað støðið. Vit eru als ikki komnir har niður enn, tí her er nógv fólk sum ikki hevur mist mótið. Og vit hava eisini fólk í oynni, sum kunnu gera íløgur.

- Tað hevur mest verið fokuserað uppá tað negativa. Tú hoyrir næstan ikki nakað um tað positiva, sum hendir her í oynni, vísir hann á.

## Ikki brúk fyri teoretikarum

Sum ein dømi um tað positiva, sum er hent í oynni nevnir Pauli Einarsson fiskavirkið Delta Seafood.

- Eg havi ikki hoyrt nógv tos um hesa successøguna. Teir fingu eitt virki upp at standa her á Tvøroyri. Síðani fóru teir á Sandoynna fyri at byggja hana upp og fingu tvey virki latin upp har.

- Og her er nakað, sum eg als ikki skilj: Hví í víðastu verð brúkar man ikki hesi fólkini sum ráðgevarar? Hvussu ber tað til, at teir kundu hava slíka succes burtur úr øllum hinum?

- Fyri mær er eingin ivi, at fáa vit tey røttu fólkini við í tjakið, og lata vit tey sleppa framat - og ikki bara teoretikarar! - so trúgvi eg uppá, at vit fáa nakað upp at standa her í oynni, sigur hann.

Fyri honum er heldur eingin ivi um, at hesi fólkini finnast. Tey eru í oynni, men tey eru ikki rættiliga sloppin framat enn.

- Tey eru í øllum førum ikki vorðin hoyrd á sama hátt, sum tey áttu at verðið hoyrd.

## Tvangsinnlagdir stertar

- Tað sum í roynd og veru skapti kreppuna og niðurgongdina í oynni, hendi tá ein flutti Suðuroynna, sum var síðsta avskipingarhavn til útheimin, norður til Farstøðina hjá Strandferðsluni í Havn.

- Soleiðis fekk Norrøna nakað at sigla við, tí nú varð hvør einasti stertur tvangsinnlagdur til at fara inn á Farstøðina í Havn, samstundis sum tú oyðilegði mong arbeiðspláss her suðuri. Tað vóru nógvir faktorar sum spældu inn samstundis, sigur hann.

Hóast truplu støðuna á mongu økjum, so ætla teir sær ikki at biðja um nakra kreppuhjálp. Teir ynskja bara somu møguleikar sum øll onnur í Føroyum.

Ein veruleiki er tað, sambært Paula Einarsson, at teir hava ikki somu treytir at virka undir sum onnur. Hann tekur sum dømi, at um ein suðringur ætlar at byggja sær ein virkisbygning, so fær hann ikki somu sømdir sum onnur.

Hann veit um eitt svar frá einum peningastovni - hetta svarið var ikki skrivligt, men munnligt! - at um eitt virki ikki bar seg har suðuri, so var tað ikki so lætt at selja tað aftaná.

- Og hetta er tað svarið man fær, tá ein ætlar sær at gera íløgur. Tað er líka sum fyri at taka mótið frá fólki. So ein sær greitt, at vit hava ikki somu treytir og møguleikar sum fólk aðrastaðni, sigur hann.

Omanfyri nevnda dømi er so um eitt virki, sum kann setast á stovn. Men ójavna kappingin rakar eisini tey verandi virkini, har støðan eisini er sera trupul.

- Eg veit frá Lemmavirkinum í Vági at teir dragast við sera høgar kostnaðir av flutninginum. Skuldu teir senda eitt sett av trollemmum úr Vági, umvegis Tvøroyri og Havnina til Klaksvíkar, so kostaði tað næstan tað sama sum at senda tað úr Føroyum til Suðurafrika. Tað vóru bara nakrar fáar hundrað krónur á muni!

- Og tá er tað bara flutningur innanoyggja. Tá eru vit als ikki komin út av landinum enn við vøruni. So tú sær, at her eru sera ójøvn vilkor at arbeiða undir.

## Norrøna á Tvøroyri?!

Undan jólum varð tann nýggja samferðsluhavnin á Drelnesi tikin í nýtslu. Hetta er ein landshavn, verður sagt, men teir á Tvøroyri hava ongatíð fingið at vita, hvør eigur hana og hvør stendur fyri rakstrinum av henni. Onkur hevur spurt, um tað er stjórin á Landsverki, sum nú skal fara undir at reka havnirnar eisini.

Á Drelnesi eru tveir møguleikar fyri atløgum. Her kundi t.d. Norrøna lagt at, um hon kom til Føroyar ein óveðursdag. Ístaðin fyri at lagt seg í Nólsoyarfirði ein heilan dag at bíða eftir líkindum, kundi kom bara fara á Drelnes.

Her kundi hon so lagt at kl. 5 um morgunin, og so kundi farmurin verið koyrdur beinleiðis umborð á Smyril, so at farmurin var í Havn tveir tímar seinni.

- Hetta kundi verðið eitt alternativ, sum veðrið gjørdist keðiligt. Hetta er ein fínur møguleiki fyri Norrønu, tí her er fínt pláss til hana, sigur Pauli Einarsson.

Á Drelnesi er nógv pláss, sum eisini er vælegnað til ídnaðarøki. Men hvat manglar so?

## Eingin undantaksstøða

- Ja, málar tú alt upp sum eitt øki í svartasta vónloysi - hvør í víðu verð skal so fara higar at gera íløgur. Tað ljóðar fyri mær sum Suðuroyggin er eitt krígsrakt øki har alt er í undantaksstøðu.

- Tí, hygg bara eftir bløðunum og lurta eftir tíðindunum úr Suðuroynni: Hvør í víðu verð kundi funnið uppá at búsett seg í oynni? Ikki ein sál, tí tú hoyrir ikki eina einastu sólskinssøgu higani. Og tá ein so sigur nakað, so verður ein bara mettur sum eitt stórt grenj, sigur hann speiskur á málinum.

Hann heldur, at suðringar hava verið sera tolnir. Yvir 300 fólk eru arbeiðsleys, og um ein mánað gerast 40 arbeiðsleys aftrat, tá liðugt er at taka teir seinastu laksarnir. So er tað liðugt í øllum førum.

Jamen, er so ikki alt bara grátt í grátt og svart í svart.

- Nei, sigur optimisturin Pauli Einarsson. Ein kundi gjørt nógv, m.a. at skipa fyri nøkrum førleikamennandi skeiðum, á sama hátt sum ein gjørdi tað í ALS á sinni. Tá skipaðu teir skeiðum til handverkarar og onnur, soleiðis at tey vórðu umskúlaði.

- Hetta hevði eisini verið ein møguleiki at gjørt her. Tað er bara ein spurningur um vilja. Um menn hava vilja til at fáa tað upp at koyra aftur her suðuri. Tí tað vísir seg, at pengar eru til, sigur Pauli Einarsson.